# Biljagstran í Suðuroynni

**Mánadagin 27. desember var ein stór biljagstran runt alla Suðuroynna. Ein ungur maður, sum var ávirkaður av rúsdrekka, koyrdi undan politinum, sum við tveimum bilum jagstraði unga mannin**

BILJAGSTRAN
*Eydna Skaale*
*eydna@sosialurin.fo*




*Mánadagin um middagsleitið var ein stór biljagstran í suðuroynni, tá ein bilur koyrdi undan tveimum løgreglubilum. Úr Vági, til Sumbiar og heilt til Hvalbiar eltu teir bilin, sum koyrdi við sera høgari ferð, áðrenn teir fangaðu hann á keiini í Hvalba*

*Savnsmynd*

Á middegi, mánadagin 27. desember, tá ein løgreglubilur av Tvøroyri var úti og koyrdi, møttu teir einum bili, sum tóktiskt koyra sera ótsútt. Hetta var á Oyrunum í Vági, og bilurin var á veg suðureftir. Løgreglan, sum var á veg norðureftir, vendi og helt aftaná bilinum, fyri at fáa eitt prát við føraran.

### Long biljagstran

Í Lopransdali komu teir fram á hann og royndu at fáa hann at steðga. Í staðin fyri at steðga, trýsti ungi bilførarin tó heldur enn meiri á speedaran, og byrjaði at koyra undan politinum.

Bilurin koyrdi við nógvari ferð og løgreglubilurin helt aftaná. Teir jagstraðu bilin úr Vági, eftir gamla sumbiarvegnum uppum Hestin, ígjøgnum bygt øki í Sumba, ígjøgnum Sumbiarbegholið norðureftir aftur, ígjøgnum Vágs bygd og norður eftir vegnum ímóti Tvøroyri.

Vakthavandi sigur, at bilurin koyrdi við sera høgari ferð, eisini ígjøgnum bygt økið, og at hann koyrdi sera ótrygt. Løgreglumenninir róptu tí á støðina, um at fáa ein annan bil til hjálpar. Ætlanin var at avbyrgja vegin, fyri at steðga skilaleysu koyringini.

Við Tjaldrarvík kom hin bilurin til hjálpar, og stillaði seg tvørturum vegin, sum ætlað. Men avbyrgingin miseydnaðist, og bilurin helt leiðina fram við høgari ferð norður eftir oynni.

### Politiið stóð eftir

Nú vóru tveir løgreglubilar, ið jagstraðu hann, ígjøgnum Trongisvág og til Hvalbiar. Framvegis koyrdi maðurin við sera høgari og óforsvarligari ferð, men løgreglan vildi ikki pressa unga mannin ov nógv, í so fall, at hann misti tamarhaldi á bilinum.

Á veg tvørturum Sandin í Hvalba royndi annar av løgreglubilunum tó at renna á bilin, ið koyrdi undan, í eini roynd at fáa hendan at steðga. Men tað gav bakslag.

– Okkara bilar eru so smart gjørdir, at um teir renna frontalt á, so steðgar øll bensininnspræning beinanvegin. Hetta er fyri at fyribyrgja eksplosiónum, um bilarnir koma í ein samanstoyt, greiðir vakthavandi á Tvøroyri frá.

Henda smarta fyribyrgingarskipan fungerar eftir øllum at døma væl, tí tá løgreglan gav hinum bilinum eitt skump, steðgaði øll bensintilførðsla til motorin beinanvegin, og løgreglubilurin bleiv tí standandi á vegnum um Sandin. Og hann var ikki til at fáa í gongd aftur.

Men jagstranin helt tó fram, bilurin koyrdi framvegis undan hinum løgreglubilinum, sum at enda fekk fangað bilføraran úti á keiini í Hvalba.

### Kenningur

Talan var um ein 19 ára gamlan mann, ið var ávirkaður av rúsdrekka. Vakthavandi sigur eisini, at hóast unga aldurin, so er ungi maðurin ein kenningur hjá løgregluni.

– Blóðroynd varð tikin, og tað er ógvuliga sannlíkt, at hann fer at missa koyrikortið, staðfestir vakthavandi.

Hann sigur eisini, at tað er sera óvanligt, at bilar koyra undan politinum. Men tað kemur fyri.

– Tað eru fleiri harrans ár síðani, at nakar seinast koyrdi undan okkum her í Suðuroynni. Tað er sjáldan at tað hendir. Men tað kann føra til óbótaligan skaða, at koyra undan á handan hátt, serliga tá koyrt verður inni í bygdum økið. Landsvegirnir her suðuri eru eisini sera smalir, so tað er vandamikið at pressa bilførarar ov nógv í eini slíkari biljagstran. Serliga tá teir eru ungir, óvandir bilførarar sum eisini eru ávirkaðir av rúsdrekka, staðfestir vakthavandi.

Koyrilíkindini í Suðuroynni vóru góð í gjár, meðan biljagstranin fór fram, og tíbetur vóru ikki serliga nógvir bilar á vegnum.

Løgreglubilurin ið varð standandi eftir á vegnum um sandin, var avheintaður dagin eftir.

# Ókeypis skipasýn

**Tryggingarfelagið Trygd fer í komandi ári at bjóða kundunum, sum hava størri skip tryggjað, eina nýggja tænastu. Talan er um sýning av skipum, sum framyvir fer at verða púra ókeypis**



*Ókeypis skipasýn verður eitt fast tilboð til allar skipaeigarar í trygd í komandi ári*

*savnsmynd*

Tryggingarfelagið Trygd fer í komandi ári at bjóða kundum, sum hava tryggjað skip síni har, at geva eina ókeypis sertænastu.

Á Trygd vísa tey á, at øll virðisgøgn mugu viðlíkahaldast, fyri at fyribyrgja skaðum. Soleiðis er eisini við skipum.

– Tá skaðar henda, er neyðugt at brúka tíð og pengar til umvæling, samstundis sum góðir dagar kunnu fara fyri skeyti. Hetta er til bága fyri bæði reiðaran, sjómannin og onnur við áhuga í skipinum, sigur Trygd í tíðindaskrivi.

Tí fara tey nú at bjóða kundum, sum hava skip í trygging, at nýta sýnsfólk hjá Tryggingarfelagnum til vegleiðing og upplýsing um viðlíkahald av skipinum.

Tænastan fer at fevna um:

– Fyrireiking av skipinum til høvuðssýn ella klassing

– Gjøgnumgongd av kravdum sertifikatum

– Gjøgnumgongd av maskinuni, meðan vanligt viðlíkahald verður gjørt.

### Metan um viðlíkahaldsætlanir

Trygd leggur dent á, at talan verður um eitt samstarv, har tryggingarfelagið er serfrøðingur innan skaðafyribyrging og reiðaran, sum best av øllum kennir skip sítt.

Henda viðlíkahaldsætlan fer væntandi at minka um óvæntaðar eykaútreiðslur av bráðneyðugum viðlíkahaldi, eins og at fyribyrgja skaðum.

**eys**

## Rætting

Í greinini um bankadeildina hjá Føroya Banka á Flogvøllinum er tíverri ein villa íkomin. Í greinini stendur nevniliga, at Ruborg Zachariassen eftir 39 ár á bankadeildini á flogvøllinum er uppsøgd. Hetta er ikki rætt, tí tá flogvallardeildin letur aftur, byrjar Ruborg Zachariassen at starvast á deildini í Sørvági. Hon hevur sostatt ikki mist starvið, men verður bert flutt.

**eys**

# Stungin við knívi

**Jóladag varð ein maður stungin við knívi, tá hann legði ímillum eitt par, ið var farið til hendurs**

Fyri tey allar flestu man jóladagur snúgva seg um frið og gleði.

Men hjá einum pari í Eysturoynni var støðan øðrvísi. Tey fóru nevniliga at skeldast so mikið illa, at tað endaði við, at annað teirra ringdi eftir hjálp.

Maðurin, sum ringt varð til, var skjótur á staðið, har hann var noyddur at leggja uppí bardaga ímilum parið.

Tað var kanska betur ógjørt, tí hann varð stungin við einum knívi í síðuna. Vakthavandi í Runavík vil tó ikki upplýsa hvat slag av knívi talan var um.

Maðurin varð beinanvegin førdur á skaðastovuna í Havn, og varð síðani innlagdur til eygleiðing. Morgunin eftir varð hann tó útskrivaður aftur, so snuddurin var eftir øllum at døma ikki so álvarsamur, sum hann lættliga kundi havt verið.